Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Edva Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Yvirskipaða rehabiliteringslóg

Spurningar:

1. Hvussu langt er komið við arbeiðinum at orða eina yvirskipaða rehabiliteringslóg, sum skal tryggja, at ein ætlan verður gjørd fyri hvønn einstakan, bæði viðvíkjandi likamligum, sálarligum og sosialum tørvi?

2. Verður tað endiliga talan um "eina hurð" til borgaran tvørtur um geirar?

3. Nær kann væntast, at arbeiðið er komið á mál og lógaruppskot kemur í Løgtingið?

Viðmerkingar:
Tá hendan samgongan bleiv veruleiki, settu vit okkum fyri at fáa loyst hetta sera týdningarmikla mál, sum øll hava bíðað eftir í rættiliga nógv ár. Vit hava tað greitt niðurskrivað í samgongskjalið. Tað tekur rúma tíð, men arbeiðið er byrjað, og tað er meira, enn man hevur kunnað sagt frammanundan. Hetta er so alneyðugt fyri borgarar og teirra familjur, sum hava brúk fyri almennum tænastum.

Tá sjúka og ymiskar avbjóðingar raka eina familju, er sera avbjóðandi at skulu brúka alla orkuna upp á at ringja runt til stovnar og ráð, uttan at at fáa eina greiða ætlan viðvíkjandi hjálp og viðgerð.

Tí verður hesin spurningur settur.

Á Løgtingi, 14. februar 2022

Edva Jacobsen